## Reinert væl frá uppgávuni

Petur Reinert, sum er okkara altjóða dómari, dømdi í gjár dystin millum FC Lathi úr Finnlandi og Dinamo Tirana úr Albania í Europe League. FC Lathi vann dystin 4-1. Vit skilja, at Petur Reinert kom væl frá uppgávuni, uttan stórvegis trupulleikar.



## Julian nýggjan venjara

Julian Johnsson og liðfelagarnir úr Svendborg hava fingið nýggjan hjálparavenjara. Lars Bech verður hjálpari hjá Kurt Hansen í komandi kappingarári. Felagið FC Svendborg hevur verið í stórari menning seinnu árini, og nú er ætlanin at vinna liðið upp í næstbestu donsku deildina. Julian Johnsson er liðskipari hjá liðnum.

# Thomassen er bjartskygdur

**Mikkjal Thomassen, venjari hjá B36, var bæði errin og harmur um úrslitið í Georgia í gjár. Hann staðfestir, at hópurin er bjartskygdur undan seinna dystinum**


uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen




*Johan Ellingsgaard, til høgru, hevði vandamestu royndina hjá B36 í gjár. Men hann gagnnýtti ikki møguleikan, tá hann var einsamallur við framherjan*

B36 skal í øllum førum skjóta tvey mál á ovari vølli í Gundadali í komandi viku, um felagið skal vinna seg í annað umfar í Europe League. Tað varð greitt seinnapartin í gjár, tá liðið legði rygg til 2-0 tap á útivølli móti Olimpi Rustavi úr Georgia.

### Vóru væl við

Hitastigini vóru 27 í tali, tá B36 skuldi royna at tryggja sær eitt nøktandi útgangsstøðið undan seinna dystinum. Og tað sá bjart út til tveir minuttir restaðu í.

Tá økti Georgi Megreladze til 2-0 eftir skjótálop, og fortreytirnar hjá føroyska árstalsfelagnum gjørdust væl truplari.

- Eg eri ikki nøgdur. Eg eri errin av avrikinum, men harmur um úrslitið. Í verjupartinum eru vit sera ansnir, har serliga Odmar Færø og Herbert í Lon Jacobsen standa seg væl. Men vit eru framvegis bjartskygdir og eru til reiðar til seinna dystin, greiðir Mikkjal Thomassen, venjari, frá.

Heimaliðið legði seg á odda longu eftir tíggju minuttum. Málskjútti var Georgi Megreladze.

### Ellingsgaard var nær við

Við einum verjukendum útgangsstøði smæddist føroysku gestirnir ikki burtur í nógva hitanum. Olimpi Rustavi legði ongantíð B36 undir veruligt trýst, og møguleikarnir vóru fáir í tali.

- Talan var als ikki um einvegis ferðslu. Jóan Pauli Dahl Jakobsen hevði bara eina veruliga bjarging í øllum dystinum. Tað var eisini stuttligt at síggja, hvussu ørkymlaður venjarin hjá teimum var, sigur Mikkjal Thomassen.

Største møguleikan hjá B36 átti Johan Ellingsgaard, sum spældi vongverji í høgru. Hann hevði skapt sær pláss í brotsteiginum hjá heimaliðnum, tá Bergur Midjord sendi bóltin fyri føturnar á honum. Men Ellingsgaard misnýtti, tá hann var einsamallur við málverjan.

- Tað var møguleikin. Ungu menninir vóru ágrýtnir og vístu dirvið, og tað er týdningarmikið í altjóða dystum. Tað var torført av álvara at seta ferð á í nógva hitanum, sum eisini var til ampa fyri heimaliðið. Men eg eri errin av mínum leikarum.

Men Mikkjal Thomassen, hvussu sannlíkt er tað, at B36 vinnur seg víðari í kappingini?

- Í løtuni er tað 25 prosent, um eg skal seta tal á. Tað verður trupult, men vit ætla okkum heilt avgjørt víðari, staðfestir Mikkjal Thomassen í horninum úr Georgia.

## Óttist ikki

Johan Carl Dam skal leygardagin verða dómari, tá Føroyar Legends og Liverpool Legends skulu dystast á Tórvølli. Johan Carl Dam hevur seinastu 40 árini verið drúgvur Liverpool-fjeppari, og tí er nærliggjandi at spyrja, um tað verður torført at verða rættvísur.

- Nei, tað skulu fólk ikki stúra fyri. So skjótt eg stíni á vøllin, so dømi eg rættvíst, líkamikið hvørji liðini eru, greiðir hann flennandi frá.

Er tað nøkur serlig løta við hesum Liverpool-leikarunum, tú minnist sera væl?

- Tað er fleiri ógloymandi løtur. Eitt nú, tá Alan Kennedy skoraði móti Real Madrid í Evropa Cup finaluni í 1981. Eg gleði meg sera nógv til hesa uppgávuna. Eg hevði so ongantíð væntað, at eg slapp at døma fleiri av leikarunum, sum eg havi sæð upp til, staðfestir Johan Carl Dam.

*- uni*